# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kafé Blákross sjavs

Vit gevast nú at spæla sjavs á Kafé Blákross. Í hesum sambandi vil eg nýta høvið til at takka tykkum øllum, sum hava hjálpt til:

- Julionnu Didriksen, sum var við til at stovna sjavsin
- Pola í Lon, sum hevur staðið fyri tí skrivliga, so sum uppteljan og annað
- Kirtin Vilhelmsen, sum hevur staðið í køkinum og hjálpt til at rudda av
- Leif Erik Niclasen, sum hevur syrgt fyri sponsorum

Eisini ein tøkk til tykkum, sum hava hjálpt til, tá eyka hevur verið gjørt burturúr - so sum til jólar.
Annars vil eg takka tykkum øllum, sum so trúliga hava møtt upp til sjavsin hvørt kvøld, síðani vit byrjaðu í februar 1999.

Til seinast vil eg takka hjartaliga øllum sponsorum runt Føroya land, sum hava stuðlað hesum tiltaki. Uttan tykkara vælvild hevði tað ikki hylnast so væl, sum tað hevur gjørt.
Peningurin, sum inn er komin, er óskerdur latin til Kafé Blákross.

Sjálvt um vit gevast at spæla sjavs á Kafé Blákross, so heldur sjavsurin tó fram í kjallarahølinum hjá Losjuni við Tinghúsvegi annað hvørt týskvøld.
Lýst verður nærri í bløðunum.

*Blíðar heilsanir*
**Sólborg Dulavík**

## Tøkk

Eg takki øllum sum við uppringingum, telegrammum, vitjanum og gávum mintust meg á 75 ára degnum.

**Brynjolf Jepsen**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jacobina Heinesen,**
**Norðragøtu**

andaðist á Eysturoyar Røktar & Ellisheimi tann 5. juli 2005, 93 ára gomul.

Kistan fer av Eysturoyar Røktar & Ellisheimi fríggjadagin tann 8. juli kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju leygardagin tann 9. juli kl. 14.00.

*Vegna familjuna*
**Magnus, Ása, Jón, Sólvá, Herborg, Anna og Ingolf**

Tey, sum ynskja at lata blómur ella krans, kunnu í staðin lata eina gávu til Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga missiónsfelagnum, ella til Gøtu kirkju, konto í peningastovnunum.



# Birgit fer – Søren kemur ístaðin

**Hósdagin í farnu viku var móttøka hildin í samband við at Birgit Kleis fer úr starvi sum ríkisumboðsmaður í Føroyum.**

RÍKISUMBOÐ
*Myndir: Bárður*

Tað hevur verið greitt líka síðani 1. desember í fjør: Men um slakan mánað kemur kemur nýggi ríkisumboðsmaðurin, Søren Christensen til Føroyar. Hann byrjar í starvinum 1. august.

Hann kemur ístaðin fyri Birgit Kleis (fødd í 1956), sum hevur verið í starvinum síðani 2001.

Nýggi ríkisumboðsmaðurin eitur Søren Christensen og er 64 ára gamal. Hann gjørdist løgfrøðingur í 1968. Hann hevur frammanundan m.a. verið deildarleiðari í einum av deildunum í danska fíggjarmálaráðnum og hevur eisini verið aðalskrivari í norðurlendska ráðharraráðnum.

Hósdagin í farnu viku bjóðaði fráfarandi ríkisumboðsmaðurin, Birgit Kleis til reseptión, ið samband við at hon nú gevst í starvinum. Hagani eru hesar myndirnar tiknar.
**sb.**







*Millum gestirnar vóru kend andlit úr bæði andstøðu og samgongu*

### Dagurin 8. juli

**Ketil biskupur.** Hesin biskupurin í Würtsburg í Týsklandi var ættaður úr Skotlandi. Sankta Kilian, sum hann varð róptur, varð saman við feløgum sínum Totnan og Kolonat tikin av døgum í árinum 689. Í Norðurlondum fekk hann navnið Ketil, ið eisini hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum. Navnið merkir *hattur* ella *hjálmur*.